# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 8. januar 2024 |
| Mál nr.: | 23/02407-23 |
| Málsviðgjørt: | AW |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum**

Við heimild í § 10, stk. 2 í løgtingslóg nr. 78 frá 1. juni 2023 um bókasøvn verður ásett:

**§ 1.** Stuðul verður veittur kommununum til menning av fólkabókasavnstænastum, harundir skipan av samstarvi um bókasavnstænastur og til keyp og menning av tilfari og tænastum.
*Stk. 2.* Stuðul til skipan av samstarvi millum kommunur um fólkabókasavnstænastur verður bert latin eftir avtalu við kommunur, ið hava fólkabókasøvn við starvsfólki við hægri bókasavnsfakligari útbúgving ella bókavarðaútbúgving í starvi.

**§ 2.** Landsstýrisfólkið fráboðar kommununum í seinasta lagi 31. mars á hvørjum ári, hvussu ætlanin er at býta játtanina, ið eftir ætlan verður sett av til stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum, fyri komandi árið.
*Stk. 2.* Stuðulin kann verða latin til skipan av samstarvi millum kommunur um fólkasavnstænastur, sbr. stk. 3, bókakeyp og talgildar tænastur.

**§ 3.** Landsbókasavnið umsitur stuðulin til menning av fólkabókasavnstænastum.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum fyri 2024 verður fráboðaður í seinasta lagi 1. juli 2024.

Almanna- og mentamálaráðið, 8. januar 2024

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen